# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Dagur 2**

Kavarokið stendur um oyrini á jólamanninum, nú hann gongur oman av Stórafjalli. Hann mutlar fyri sær sjálvum, meðan hann brýtur seg gjøgnum kavan.

“Hetta er síðstu ferð eg beri gávur oman í Hvannadal – hetta eri eg blivin alt ov gamal til”.

Hann steðgar á, setur hondina fyri pannuna og roynir at skimast eftir, um hann sær ljósini í bygdini. Jú mín sann. Sjálvt um nógv kavarok er fyri framman, so sær hann nøkur veik ljós hómast har niðri í bygdini.

“Hetta fer at taka eina løtu”, hugsar hann. “Hevði eg verið yngri, so hevði eg verið í bygdini longu nú. Bara tey ikki bíða eftir mær”.

Mitt í bygdini er ferð á monnum. Í samband við at jólamaðurin skal koma, so eru menn í fer við at seta ein pall upp, og tað er eingin annar enn Jógvan yvirpolitimeistari sum skipar fyri:

“Erling Erling ERLING!!! Halt fast í hasari plátuni – statt ikki sum eitt býtt”, rópar Jógvan yvirpolitimeisari.

“Jú men, jú men eg haldi plátuni – sært tú ikki tað?”.

“Hatta er skeiv pláta, tú heldur í – eg skuldi ongantíð biðið teg hjálpt til, tú ert ein ónytta”, rópar Jógvan aftur.

“Góði ikki verða óður – jólamaðurin kemur skjótt, og tá tað er jól, so mugu øll verða góð”. Jógvan tímir ikki at svara Erlingi aftur, men ristur bara við høvdinum.

Trølla Pætur og Trølla Omman eru á veg til húsa.



Tey hava verið niðri hjá Kára Handilsmanni og keypt, og nú hevur Trølla Omman lovað Trølla Pætur, at hon skal fara at gera pannukøkur, tí tað er tað besta, sum honum dámar. Meðan tey ganga niðan brekkuna tosa tey um jólini.

“Omma – fert tú at keypa mær nakra jólagávu í ár?”

“Og góði fitti Trølla Pætur, sjálvandi fari eg tað”.

“Jamen, tú mást ikki stjala gávuna, tú mást gjalda hana”.

“Allar besti Trølla Pætur. Eg skal lovað tær, at tú skalt fáa eina góða og stóra gávu frá mær, og eg skal sjálvandi gjalda hana”.

“Tað ljóðar gott omma. Tí tað er einki stuttligt hjá mær at halda jól, um tú situr í geglinum”. Meðan tey práta aftur og fram, vita tey ikki av, fyrr enn tey eru komin heim. Tey fara innar, og meðan Trølla Pætur setur seg niður at klippa jólapynt, so fer omman í gongd við at gera pannukakur.

Inni hjá Stampi og Anthonio er verri skil. Teir eru kaldir og sera ringum hýri.

“Stampi, hvat skulu vit gera – eg eri bæði svangur og kaldur. Kom oman í bygdina og stjali okkum okkurt at eta. Eg eri gorhungraður”.

“Anthonio, ert tú býttur? Vit kunnu ikki fara oman í bygdina fyrr enn tað blívur myrkt, annars verða vit tiknir av Jógvani og Erlingi”.

“Jú men, eg eri so svangur”.

“Anthonio skilur tú einki? Vit mugu bíða til tað blívur myrkt. Ikki fyrr enn tá kunnu vit fara oman í bygdina. Og tá vit fara, so fara vit bæði at stjala bæði mat og leikur”.

Og soleiðis sita teir báðir og tosa um, hvar og nær teir skulu fara á rannsmannaveiðu.

Uttan fyri fella flykrur niður av himli, og meðan eitt barnakór syngur vakrar jólasangir uttan fyri hjá Kára Handilsmanni, ganga fólk og aftur og fram í gøtunum og hugna sær.

*Puntur 2 til jólakalendaran*




